# KJ Hydraulik smíðar alibát nummar 25

**KAMBSDALUR – Tá vit bygdu fyrstu alibátarnar, høvdu teir krana, sum var eini 8 tons stórur. Hetta varð hildið at vera ríkiligt. Í dag eru kranarnir 23 tons, og teir verða helst enn størri, sigur sølumaðurin hjá KJ Hydraulik, Jóannes Mørkøre**

Vilmund Jacobsen

KJ Hydraulik smíðar í løtuni alibát nummar 25. Flestu av bátunum, sum felagið hevur bygt, eru umbidnir av føroyskum alifeløgum, men onkur einstakur er eisini smíðaður til Skotlands og Íslands.

Alibátur nummar 25, er samstundis sjeyndi báturin, sum KJ Hydraulik hevur smíðað, síðan føroyska alivinnan veruliga kom fyri seg aftur fyri 3-4 árum síðan.

Tveir eru smíðaðir til Marine Harvest, tveir til Luna, ein til Viking Seafood og báturin, sum nú stendur í gerð, er hin triði í røðini síðan 2008, sum Bakkafrost hevur umbiðið.

Jóannes Mørkøre, sølumaður hjá KJ Hydraulik, sigur, at skrokkarnir verða teknaðir á Kambsdali, men sjálvt stálarbeiði verður gjørt í Letlandi.

– Talan er um HydroCat-modellið, sum hesir bátar verða róptir. Flestu eru 13 metrar langir og seks metrar breiðir. Tveir eru tó 15 metrar langir.

> **... Alibátarnir verða bygdir sum tvíkiljur. Teir eru ógvuliga stúttir á sjónum, og arbeiðsdekkið er sera rúmligt, einar 80 fermetrar...**
>
> JÓANNES MØRKØRE

eftirhondini hevur fleiri ár á baki og hevur verið gagnligt.

– Skrokkarnir eru úr stáli, tí neyðugt er, at bátarnir eru sterkir, leggur Jóannes Mørkøre aftrat.

Teir fyrstu bátarnir, sum KJ Hydraulik smíðaði, vórðu bygdir hjá Hydro Tech á Eiði, sum felagið á Kambsdali átti.

– Hin seinasti varð smíðaður á Eiði í 2003. Hesin báturin, sum fór til Íslands, varð eisini sveisaður á Eiði.

Jóannes Mørkøre sigur, at tá skrokkarnir koma heim úr Letlandi, eru tað fólk hjá KJ Hydraulik, sum gera alt monteringsarbeiði við motori, krana, spæli og fóðurkanón, sum KJ Hydraulik eisini framleiðir.

– Síðan hava vit undirveitarar til eitt nú el, timbur og nautiska útgerð.

Sølumaðurin sigur, at alibátarnir við árunum eru vorðnir eitt sindur longri, breiðari og hava størri motor og krana.

– Tá vit bygdu fyrstu bátarnar fyri góðum 10 árum síðan, var kranin eini 8 tons stórur, og hetta varð hildið at vera ríkiligt. Í dag eru kranarnir 23 tons, og teir verða helst enn størri.

## KJ eigur konseptið

Sølumaðurin sigur, at samstarvið millum KJ Hydraulik og felagið í Letlandi, sum smíðar skrokkarnar,

## Eftir egnum ynski

Jóannes Mørkøre sigur, at alarar saktans kunnu biðja um ymiskar broytingar, soleiðis at bátarnir í enn størri mun verða eftir egnum ynski.

– Alibátarnir verða bygdir sum tvíkiljur. Teir eru ógvuliga stúttir á sjónum, og arbeiðsdekkið er sera rúmligt, einar 80 fermetrar. Bátarnir verða brúktir til at føra fóður við, til ymiskt viðlíkahald av alistøðunum, eitt nú til skiftan av fortoyningum og nótum. Við góðum krana og spæli við trimum koppum á stórum arbeiðsdekki kann nógv gerast, sigur sølumaðurin.

Báturin, sum Bakkafrost nú letur smíða á Kambsdali, verður sambært sáttmálanum latin hin 12. mai í ár.

vilmund@sosialurin.fo



**VELDUGT DEKSPLÁSS**

*KJ Hydraulik hevur smíðað fleiri alibátar á Borðoyarvík, men báturin, sum verður latin 12. mai í ár, verður smíðaður í stórum »tjaldi« á Kambsdali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**SØLUMAÐUR OG TEKNARI**

*Jóannes Mørkøre, sølumaður og Bárður Heinason, verkfrøðingur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bárður Heinason teknar alibátar

**KAMBSDALUR KJ Hydraulik teknar í løtuni ein nýggjan og minni alibát, sum skal verða væl egnaður til ymiskt eftirlit við alistøðirnar**

Vilmund Jacobsen

Tá Sosialurin vitjaði KJ Hydraulik á Kambsdali seinasta mikudag, segði sølumaðurin, Jóannes Mørkøre, at teir í løtuni eru í holt við at tekna ein nýggjan alibát. Ætlanin er, at hetta skal verða ein minni bátur við nýggjum sniði – og til aðrar uppgávur enn hin stóri báturin, sum felagið hevur smíðað fleiri av.

Tað er verkfrøðingurin, Bárður Heinason, sum teknar og tillagar nýggja bátin, sum er í stoypiskeiðini hjá KJ Hydraulik.

– Fyrr høvdu alarar smáar glastrevjabátar, men hesir vóru ov smáir til stórar og tungar uppgávur. Síðan keyptu teir nakrar stórar bátar og kanska spardu onkran minni bát burtur.

Sølumaðurin sigur, at í dag eru tað alarar, sum hava stórar bátar, men sum eisini ynskja sær eina minni tvíkilju til ymiskar eftirlitsuppgávur, eitt nú til at kekka ringar, nótir, deyðan fisk, ella hvat tað nú kann verða.

– Hetta verður eisini ein tvíkilja, tí bátaslagið gevur góðan stabilitet, lítið rull og gott deksplass, sigur sølumaðurin hjá KJ Hydraulik, Jóannes Mørkøre.

vilmund@sosialurin.fo